Trupulleikar við flogferðafólki

Ferðafólk, sum skulu uttanlands við flogfari, hava ofta eingi samleikaprógv uppi á sær, tá innskrivað verður á flogvøllinum. Hetta kann gera, at tey fáa trupulleikar av at sleppa umborð, eins og tað kann seinka fráferðini hjá flogfarinum óneyðugt

FLOGFERÐSLA
Edvard Joensen

Flogvøllurin: Ferðafólk, sum ferðast við flogfari, skulu hava eitthvørt skjal, sum vísir, hvørji tey eru, áðrenn tey koma til innskrivingardiskin á flogvøllinum. Hava tey ikki tað, kann tað gera, at tey í ringasta føri ikki sleppa við flogfarinum.

Hesar reglur eru settar í gildi av ríkisløgregluni, sum síðani hevur álagt Statens Luftfartsvæsen at umsita tær. Statens Luftfartsvæsen hevur síðan aftur álagt flogfeløgunum, sum flúgva um danskar flogvallir, eisini Vágar, at syrgja fyri, at hesar reglur verða hildnar, verður sagt av kunningarskrivstovuni hjá Maersk Air í Kastrup.

Tað kemur javnan fyri, siga tey, sum checka inn á flogvøllinum í Vágum, at fólk koma til diskin og eingi skjøl hava við sær annað enn ferðaseðilin. Tað er ov lítið, tí flogfeløgini krevja at vita, hvør tað er, sum ferðast við flogførunum, og ikki bara, hvør stendur á ferðaseðlinum. Hetta eru krøv, sum feløgini hava sett eftir hendingarnar í USA tann 11. september í fjør.

Tað vanliga er, at tann, sum avgreiðir feðrafólkini, krevur at síggja eitt pass. Tó kann eisini annað samleikaprógv við mynd brúkast. Eitt nú eitt koyrikort.

Men mest nærliggjandi er hjá starvsfókunum at biða um passið, tí væntað verður, at fólk, sum ferðast millum lond, hava pass við sær.

Men soleiðis er verri enn so altíð, tá fólk fara úr Vágum, verður sagt av Flogfelag Føroya, sum avgreiðir nógv ferðafólk í Vágum.

Fólk, sum ferðast um flogvøllin, fara fyri ein stóran part til Danmarkar, hóast sjálvandi nógv fara víðari. Teimum, sum fara víðari úr Danmark, er eingin trupulleiki við.Tey vita, at tey skulu hava pass við sær.

Men tey, sum bara skulu til Danmarkar, gloyma alt ov ofta at hava pass uppi á sær, tá ferðast verður. Grundin er væl saktans tann, siga tey á flogfelagnum, at ikki er lógarkrav at hava pass við til Danmarkar. Men um so var, at tey í staðin høvdu eitthvørt annað, sum vísti, hvørji tey vóru, hevði tað hjálpt munandi, verður sagt.

Serliga er tað, tá ferðast verður við børnum, at trupulleikar kunnu stinga seg upp. Eingi samleikaskjøl eru, sum vísa, hvørji børnini eru, uttan so, at tey standa í passinum hjá foreldrunum. Á einum koyrikorti er til dømis einki, sum sigur, at tú eigur børn.

Eisini er tað ein trupulleiki, tá børn ferðast einsamøll ella saman við øðrum enn foreldrunum, at tá er einki pass heldur, sum vísir, hvørji tey eru.

Ferðafólk, sum ferðast um flogvøllin i Vágum, møta alt ov ofta upp við innskrivingardiskin við ongum samleikaprógvi, sum greitt kann vísa á, at tann, sum feðrast, er tann sami, sum stendur á ferðaseðlinum. Ein góður máti at sleppa undan trupulleikum á feðrini, er altíð at hava passið hjá sær, Eisini um bara verður farið til Danmarkar. Ferðamaðurin á myndini hevur pass við sær

Mynd: Edvard Joensen

Mette Christensen á kunningarstovuni hjá Maersk Air í Kastrup sigur við Sosialin, at tey hava eisini havt ávísar trupulleikar í Kastrup, men at fólk nú eru farin at vera meira ansin í so máta. Fólk hava so at siga altíð eitthvørt samleikaskjal við sær. Vanliga er tað passið. Hon heldur ikki, at serligir trupulleikar eru av føroysiga starvsfók á Flogfelagnum, at tey noyðast at biða fók fara at finna samleikaprógvini fram.

Og tað tekur tíð, tá tey skulu at ringja og senda telefaks og hvat nú kann verða burturúr. Tað seinkar ingum, sum ferðast um flogvøllin í Kastrup. Ikki nakað, tey hava lagt merki til í hvussu er, sigur hon.

Men á flogvøllinum í Vágum kemur enn fyri, at tey skulu hava pass uppi á sær, tá ferðast verður. Grundin er vælsaktans tann, siga tey á flogfelagnum, at ikki er lógarkrav at hava pass við til Danmarkar. Men um so var, at tey í staðin høvdu eitthvørt annað, sum vísti, hvørji tey vóru, hevði tað hjálpt munandi, verður sagt.

Serliga er tað, tá ferðast verður við børnum, at trupulleikar kunnu stinga seg upp. Eingi samleikaskjøl eru, sum vísa, hvørji børnini eru, uttan so, at tey standa í passinum hjá foreldrunum. Á einum koyrikorti er til dømis einki, sum sigur, at tú eigur børn.

Eisini er tað ein trupulleiki, tá børn ferðast einsamøll ella saman við øðrum enn foreldrunum, at tá er einki pass heldur, sum vísir, hvørji tey eru.